

# Leys størv

## Pedagogar til nýggja frítíðarskúlan í Hoyvík

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 1. januar 2007 ella eftir nærri avtalu, og einum pedagogi til sertoymið at arbeiða 20 tímar um vikuna, at byrja 1. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn** saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Hoyvík, Vegurin Langi, 188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi mánadagin, 18. desember 2006.

**Meiri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Levi Mørk, stovnsleiðara, á tlf. 21 01 26 ella 58 57 39.

## Pedagogur til Býlingshúsið millum Gilja

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 15. desember 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti:** Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn** saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, 188 Hoyvík í hendi seinast mánadagin, 11. desember 2006.

**Meiri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Jónu Guttesen, stovnsleiðara, ella Poulu Højgaard, varaleiðara, á tlf 318372.

## Pedagogar og hjálparfólk til dagstovnin Kurl@

Søkt verður eftir tveimum pedagogum at arbeiða 32 tímar um vikuna, at byrja 2. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

Eisini verður søkt eftir einum hjálparfólki at arbeiða 32 tímar um vikuna, at byrja 2. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn** saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Kurl@, Sundsvegur 3, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi hósdagin, 14. desember 2006.

**Meiri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Marjuna J. Hentze, stovnsleiðara á tlf. 35 35 00.

## Dagrøktarar til barnaansingina í Tórshavnar Kommunu

Søkt verður eftir dagrøktarum til Tórshavnar kommunu, at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt sjálvstøðugt, fjølbroytt starv og hollan stuðul frá kommunalu skipanini. Fyri at hava børn í dagrøkt krevst, at ein hevur hóskandi rúm, og at møguleikar eru fyri uttanduravirksemi.

**Setanarviðurskifti:** Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Umsókn** saman við upplýsingum um útbúgving og royndir umframt møguligum viðmælum skal vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin, 11. desember 2006.

**Meiri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Trónd Ennistíg, dagrøktarleiðara, á tlf. 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ

## Einalærari í Sandvíkar Skúla

Tíðaravmarkað starv sum einalærari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í Sandvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 4. januar – 30. juni 2007.

Í Sandvíkar skúla eru 5 næmingar í 1. – 4. flokki.

**Um starvið:**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir árbyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlag ongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv:**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøki er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Sandvíkar skúla.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2 – 30.2.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 8. desember 2006 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**Mentamálaráðið**

## Bilførari søkist

Vit sóknast eftir førara við stórum koyrikortið og sum eisini hevur áhuga í at arbeiða á goymsluni tá tørvur er á tí.

Fyrimunur er um tú er vanur at koyra lastbil.

Vanlig arbeiðstíð er mánadag til fríggjadag 8-16, men yvirarbeiði kann koma fyri.

Løn sambært avtalu.

Vinarliga send umsókn við viðmælum til:

**Damfar**
Postboks 154
110 Tórshavn

Damfar

Sosialurin
Sosialurin i